**Spurningur 1**
Kunnu tit geva eina vegleiðandi og ikki bindandi meting av, hvussu nógv skeið í ávikavist Copilot Chat og Copilot Business væntandi verða hildin hvørt hálvár, og hvussu nógvir luttakarar vanliga kunnu væntast á hvørjum skeiði?

**Svar 1**
Við tað at talan er um eitt nýtt skeið, hava vit trupult at meta um hvussu stórur tørvurin er. Vit síggja fyri okkum, at vit koyra 1-2 skeið út, og um hesi fyllast, so kunnu vit bjóða eyka skeið. Alt hetta verður tó í samráð við veitaran.

---

**Spurningur 2**
Hvørjir stovnar og starvsfólkabólkar kunnu tekna seg til skeiðini? Eru skeiðini ætlað øllum starvsfólkum innan tað almenna, bert landsstovnum ella einum meira avmarkaðum bólki?

**Svar 2**
Øll starvsfólk hjá stovnum landsins, tvs undir Føroya landsstýrið, kunnu tekna seg til skeiðini.

---

**Spurningur 3**
Kunnu kommunur, skúlar, heilsuverkið, almenn partafeløg og sjálvstøðugir almennir stovnar eisini tekna seg til skeiðini?

**Svar 3**
Víst verður til svar 2. Heilsuverkið er ein landsstovnur og nakrir sjálvsognarstovnar hoyra undir Føroya Landsstýrið. Vit vita ikki hvat ein sjálvstøðugir almennur stovnur er.

---

**Spurningur 4**
Kunnu tit harumframt geva eina vegleiðandi meting av, hvussu stórur samlaði málbólkurin fyri skeiðini er?

**Svar 4**
Talan er um 3.000-4.000 starvsfólk